

## Ritu fyri Mása

Verður tað sum Jóhan Dahl, landsstýrismaður við vinnumálum ætlar, so siglir Ritan til Svínoyar og Fugloyar, áðrenn veturin kemur. Fríggjadagin hevði Klaksvíkar kommuna biðið um fund við Jóhan Dahl, landsstýrismann, um farleiðina til Svínoyar og Fugloyar. Við á fundinum vóru Jóhan Dahl og Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík, umframt umboð fyri umsitingina og umboð fyri oyggjarnar. Eftir fundin var púra greitt, at ætlanin er, at Ritan skal røkja siglingina til hesar oyggjarnar, áðrenn vetrarsiglingin byrjar. Jóhan Dahl roknar við at finna fígging, samstundis sum hann er staðfestir, at farmaleiðin, sum hevur verið til Skúvoyar við Rituni eina ferð um vikuna, framvegis fer at vera veruleiki. Másin siglir upp á lánta tíð, og frá august er óvist, um skipið verður góðkent av skipasýninum at sigla víðari. Eyðun Jacobsen, fyrrverandi borgarstjóri í Svínoy fegnast, at eitt betri skip nú er ávegis. Meirkostnaðurin fyri broytingarnar, ið helst fara fram á hesum leiðum, fer at liggja um eina fimm milliónir krónur um árið.

# Reiðari vitjar heimstaðin

**Svenski reiðarin á Fure Tankers, Lars Höglund, sum fyri stuttum skrásetti eitt av kemikaliuskipum sínum undir FAS við Nólsoy sum heimstaði, helt fríggjadagin fund við leiðsluna í FAS úti í Nólsoy**

FAS
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fyri stuttum bórust tey tíðindi, at eitt svenskt reiðarí hevði skrásett eitt av sínum kemikaliutangaskipum undir FAS við Nólsoy sum heimstaði. Talan var um Fure Star.

Reiðarin, Lars Höglund, greiddi tá í Sosialinum frá, at orsøkin til, at teir valdu júst Nólsoy var, at hon var fyrsta oyggin sum gav le, tá teir komu undir land í baldrutum veðri.

Ein onnur orsøk var eisini, at reiðaríið Fure Tankers hevur heimstað á einari lítlari oyggj í svenska skergarðinum út fyri Göteborg, Donsö, og tí fall tað natúrligt, at velja eina lítla oyggj í Føroyum sum heimstað hjá skipunum.

Lars Höglund greiddi á túrinum til Nólsoyar við bjargingarbátinum LÍV frá, at hetta var fyrstu ferð, at hann setti fótin á land í Nólsoy, tó at hann mangar ferðir hevði skoða inn á oynna. Hann greiddi eisini frá, at hann á mongu ferðum sínum í Føroyum ofta hevði hoyrt menn tosa um bragdið hjá Ova Joensen.

Nú hann, saman við fíggjarstjóranum og grannskoðaranum, er í Føroyum at hava fund við FAS, helt hann tað verða rímiligt, at fundurin varð hildin í Nólsoy, soleiðis sum stjórin á FAS, Tommy Petersen, skjeyt upp.

### Spennandi útlit

Lars Höglund kundi á ferðini upplýsa, at eitt systirskip til Fure Star verður skrásett í FAS í hesi vikuni, og at eitt triðja skip hjá reiðaríinum verður skrásett í september. Hetta skipið er nakað størri enn hini bæði fyrstu, og øll verða skrásett við Nólsoy sum heimstaði.

Svenski reiðarin upplýsti eisini, at á Dansö, har reiðaríið hevur heimstað, eru fleir onnur reiðarí, og at tilsamans 50 skip eru heimahoyrandi har. Tað er ein góður møguleiki, at fleiri av hinum reiðaríunum velja at skráseta síni skip undir FAS eisini.

- Tey halda eyga við, hvussu leikur fer hjá okkum, sigur Lards Höglund.

Tey seks skipini, sum Fure Tankers eiga, hava verið skrásett undir NIS, sum er norska altjóða skipaskrásetingin, og tað er helst broytingin í reglugerðini fyri FAS sum ger, at útlendsk reiðaríir nú velja at skráseta síni skip í Føroyum.

Í løtuni eru eini 35 skip skrásett í FAS, men við Fure Tankers sum slóðbrótara er væl hugsandi, at talið fer at økjast munandi komandi mánaðirnar.



*Pär Karlsson, fíggjarleiðari, Lars Höglund, reiðari og Peter Gårdström, grannskoðari hjá Fure Tankers undir Ærisportrinum í Nólsoy*
*Mynd: Leo Poulsen*

# Fleiri skip á veg í FAS

**Tað eru spennandi tíðir fyri Føroysku Altjóða Skipaskrásetingina, nú minst sjey skip eru á veg**

FAS
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í kjalarvørrinum av Fure Tankers tykjast nú fleiri onnur skip á veg inn í FAS.

Fure Tankers skrásetir eitt systirskip til Fure Star í skrásetingini í hesari vikuni, og síðani er ætlanin at skráseta enn eitt skip í september. Men tað steðgar ikki har.

Eitt norskt reiðarí hevur júst skrásett eitt dóttirfelag í Føroyum, og ætlanin er síðani at skráseta eitt skip undir FAS.




*Tommy Petersen, stjóri á FAS, við einum faldara av Fure Sun, sum verður skrásett í FAS í vikuni, og búmerkinum hjá Fure Tankers. Sviarnir kunnu byrja eina innrás av fremmandum skipum í FAS*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Eisini er eitt íslendskt skip á veg inn í FAS, og føroyska reiðaríið, Supply Service, letur trý skip byggja til off-shore vinnuna, sum ætlandi øll skulu skrásetast undir FAS. Fyrsta av teimum verður væntandi skrásett um mánaðarskiftið.

- Tað sær rættiliga út til, at glið er komið á, og at arbeiðið, sum gjørt er seinastu tíðina veruliga ber frukt, sigu Tommy Petersen, stjóri á FAS.

### Avleiddar inntøkur

FAS leggur nakað av pengi eftir sær í landinum. Skrásetingargjaldið er 110.000 krónur fyri hvørt skip, og hartil kemur eitt tonnaguavgjald, og so tann skattur, sum partafeløgini kasta av sær.

- Men tað er ikki lagt upp til ta stóru inntøkuna frá skipunum beinleiðis. Inntøkurnar skal í stóran mun koma frá avleiddum virksemi, sigur Tommy Petersen.

Hann hugsar serliga um shippingfeløg, sakførarar og aðrar fyritøkur, sum eru tengdar at vinnuni.

- FAS stendur á fíggjarlógini við inntøkum, men ikki útreiðslum. Tað merkir, at vit skulu klára at halda okkara útreiðslur frá egnum inntøkum. Og sigast má, at tað eru spennandi tíðir fyri FAS í løtuni, og komandi hálva árið sær ljóst út, sigur Tommy Petersen, stjóri á FAS.